Yvirlæknarnir á barnadeildini:

# Umleggingarnar kunnu verða lívshóttandi



*Við umleggingunum missir føðideildin serkunnleika í eygleiðing av diskretum sjúkuteknum hjá nýføðingum, so fleiri børn væntandi koma seint í viðgerð við vanda fyri lív og heilsu, siga Odmar Færø og Fróði Joensen, yvirlæknar á barnadeildini í skrivum, Sosialurin hevur fingið innlit í*

*Modellmynd: Bárður Lydersen*

**Umskipanin av føðideildini kann hava við sær, at føðideildin missir serkunnleika í eygleiðing av diskretum sjúkuteknum hjá nýføðingum. Tað kann hava við sær, at fleiri børn koma ov seint í viðgerð, og tað kann verða lívhættisligt, siga teir báðir yvirlæknarnarir á barnadeildini, Odmar Færø og Fróði Joensen**

UMLEGGINGAR Á FØÐIDEILDINI
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Í einum skrivi, Sosialurin hevur fingið innlit í, siga yvirlæknarnir á barnadeildini, Odmar Færø og Fróði Joensen, teirra meining um umleggingarnar á føðideildini. Teir eru samdir við sjúkrarøktarfrøðingunum í, at slíkar umleggingar áttu ikki at verið gjørdar.

– Uppskotið útholar neonatologisku funktiónina á Landssjúkrahúsinum, siga teir báðir. Teir vísa á, at í Danmark manna ljósmøður ikki neonataldeildir nakrastaðni, teimum vitandi, og tað er neyvan fakliga ella fakpolitiskt haldbart at innføra hesa skipanina í Føroyum.

### Lívshóttandi

Barnalæknarnir vísa somuleiðis á, at skipanin, sum hon er í dag, hevur nakrar heilt greiðar fyrimunir.

– V it halda, sum áður, at tað eru nógvir fyrimunir við tilboðnum hjá barnakonum at verða fimm dagar á barsilsgongini. Tær fáa meira stuðul til bróstageving, trygging av, at barnið fær nóg mikið og trívist, tá tað fer heim, uppfangan og tíðliga viðgerð av sera álvarsomum sjúkum, sum eitt nú gulsótt og viðføddar hjartasjúkur, sum vanliga ikki vísa seg fyrr enn barnið er nakrar dagar gamalt, siga barnalæknarnir.

Harafturat liggja sjúku pinkubørnini burturfrá øðrum smittandi sjúklingum, og mammurnar eru longu nær sjúku børnunum og skulu sostatt ikki flytast.

Neonatalstovan er sera lítil, og rúmar ikki nógvum fólkum, og tískil kann viðgerðin í nógvum førum gevast inni á vanligu barsilsstovuni hjá mammuni.

Sjúkrarøktarfrøðingarnir, ið taka sær av teimum sjúkastu børnunum, gerast eisini royndar í at kenna aftur og reagera upp á diskret tekin til byrjandi sjúku hjá nýføðingum. Soleiðis kann byrjandi sjúka ofta staðfestast tíðliga, og viðgerðin setast í verk áðrenn sjúkran er vorðin ov hættislig.

– Við umleggingunum missir føðideildin serkunnleika í eygleiðing av diskretum sjúkuteknum hjá nýføðingum, so fleiri børn væntandi koma seint í viðgerð við vanda fyri lív og heilsu, siga Odmar Færø og Fróði Joensen í skrivinum.

### Roynd starvsfólk

Odmar Færø og Fróði Joensen undirstrika, at tað er altumráðandi at hava so roynd starvsfólk sum gjørligt at ansa eftir sjúkum nýføðingum.

– Og á Landssjúkrahúsinum hava vit ikki onnur roynd starvsfólk enn tey á A2, og tí eigur hendan uppgávan sjálvsagt at verða verandi hjá teimum. Vit meina ikki, at ein frá neonatologiskum sjónarmiðum kann verja at hava minni enn tveir sjúkrarøktarfrøðingar á vakt um eitt barn fær tørv á eitt nú nasal CPAP viðgerð, sum er ein intensiv røktaruppgáva.

Teir báðir meta, at hóast tað er plásstrot á A2, so er núverandi skipan nøktandi og úrslitini av neonatalu viðgerðini eru góð, og foreldur eru sum heild væl nøgd við tilboðið. Innanfyri verðandi karmar duga teir ikki at síggja, hvussu neonatalfunktiónin kann leggjast betri.

Ulrike Steuerwald, barnalækni:

# Vandamikið og kaotiskt

**Fyrrverandi barnalæknin á Landssjúkrahúsinum, Ulrike Steuerwald, metir tað ikki vera hóskandi at umskipa føðideildina, tí tað kann gerast bæði vandamikið og kaotiskt hjá bæði sjúkrarøktarfrøðingum, jarðarmøðrum og læknum, um talan ikki er um eina greiða skrivliga mannagongd**



UMLEGGINGAR Á FØÐIDEILDINI
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

– Um jarðarmøður eisini skulu taka sær av sjúkum pinkubørnum, so verður hetta fyrsta sjúkrahúsið, eg veit um, sum letur jarðarmøður gera arbeiðið, sum sjúkrarøktarfrøðingar gera, sigur Ulrike Steuerwald í einum skjali, sum Sosialurin hevur fingið innlit í.

Hon metir tað ikki vera hóskandi at umskipa føðideildina, tí eftir hennara tykki eru sjúkrarøktarfrøðingarnar teir, ið hava neyðuga serkunnleikan at viðgera og taka sær teimum viðbreknu pinkubørnunum. Og hetta er ikki eitt arbeiði, ið ein og hvør kann gera.

– Tá tit ikki hava nakran serlækna innan øki og heldur ongan neonatalan sjúkrarøktarfrøðing, eigur ein at verða glaður fyri, at føðideildin hevur verið før fyri at finna starvsfólk, sum kunnu útinna eina serstakliga góða neonatala viðgerð - eisini fyri alt ov tíðliga fødd pinkubørn, heldur hon.

Hon vísir eisini á, at tað fara eisini at koma uppgávur, sum ein jarðarmóðir als ikki hevur loyvi at taka sær av. Og so leingi ongin er samdur um eina skrivliga mannagongd, so kann støðan gerast bæði vandamikil og kaotiskt - bæði fyri sjúklingar og starvsfólk.

# Vilja hava svar í dag

Í skrivi, Felagið fyri Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar, hevur sent leiðsluni á Landssjúkrahúsinum mánadagin 18. apríl krevja tey, at:

1. Sjúkrarøktin á A2 skal verða fyristin og leidd av sjúkrarøktarfrøðini, ið hevur fyrisitingarliga, fíggjarliga og fakliga ábyrgd av sjúkrarøktini.

2. Reglugerðir fyri arbeiðs- og ábyrgdarøkini skulu fyriliggja, áðrenn nøkur broyting verður sett í verk.

Hesar reglugerðir umfata neonatala økið, alt sjúkuøkið og annars alt arbeiði á A2.

Enn einaferð ávarar felagið ímóti nevndu broytingum og avleiðingum, ið kunnu standast av teimum. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar krevur hartil eisini svar frá leiðsluni í seinasta lagi í dag, mikudagin 20. apríl klokkan 15.

-ib